# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# SAKNA TEIR GÓÐU LÆRARARNAR

Annfinnur í Skála finst at málburði okkara. Hann spyr, hvar Ívar, Niels Juel, Axel, Oskar og Jóan Hendrik eru. Við øðrum orðum heldur maðurin, sum í eitt mannaminni hevur verið studentaskúlalærari, at vit duga alt ov illa føroyskt. Og serliga eru tað fjølmiðlafólk, sum ikki duga.

Og Annfinnur hevur púra rætt. Fjølmiðlafólk duga ikki nóg væl føroyskt. Sum ábyrgdari á miðlaredaktiónum kann eg skriva undir uppá, at fólkini - við og uttan fjølmiðlaútbúgving, duga alt ov illa føroyskt. Og eg kenni tað aftur. Tá eg kom í studentaskúlan í 1983 søgdu lærararnir har, at vit sum heild dugdu ov illa føroyskt. »Jamen so lærið okkum«, søgdu vit, men hetta var ikki uppgávan hjá studentaskúlanum. Hetta var uppgávan hjá fólkaskúlanum, tí tá næmingar komu í Hoydalar, so áttu tey at dugað at málborið seg á skift og í talu á føroyskum. Men soleiðis var veruleikin ikki.

Á Læraraskúlanum var sama søgan. Tá spurt varð, so var svarið, at »hatta áttu tit at lært í Hoydølum«. So tá næmingar fóru av Læraraskúlanum við 03 í føroyskum á grundstigi, so yptu lærararnir har bara øksl og søgdu, at tit áttu at lært hatta í fólkaskúlanum og í studentaskúlanum.

So kunnu vit bara ímynda okkum, hvat hesir stakkals fólkaskúlalærarar siga, tá teir síðani koma í fólkaskúlan við einum 03 í føroyskum á Føroya Læraraskúla og fara at læra nýggjar lítlar føroyingar at stava og málbera seg á føroyskum. Hvat er problemið? Er føroyskt eitt ov trupult mál at læra? Nei, yvirhøvur ikki. Føroyskt er als ikki verri at læra enn onnur mál. Men eingin vil kenna sær ábyrgd av at taka um endan at læra lærarar at stava føroyskt.

Tað hevði so í øllum førum hjálpt, um allir lærarar í fólkaskúlanum dugdu betur føroyskt enn ein miðal næmingur í 9. flokki. So hevði nógv verið vunnið. Eg eri bangin fyri, at fleiri lærarar ikki duga betur enn ein miðal 9. floks



hava ringa ávirkan á málburðin hjá vanliga føroynginum.

– Eg meti, at føroyingar duga eins væl sítt móðurmál, sum fyri Arge og Ívar Iversen gjørdu nógv burturúr at vegleiða útvarpsfólk. Fjølmiðlafólk mugu læra seg at brúka orðabók, segði hann við blaðið.

**Stórur saknur í teimum málkønu**

Brot úr hugleiðingunum hjá Annfinni í Skála í grein á heimasíðuni hjá Sprotanum:

»Lat meg siga eitt fyrst, fólk halda, at føroyskt ikki kann nýtast í øllum lutum, at tað er ov fátækt, tungt og tvørligt, og at ikki ber til at festa á blað alt tað, sum er neyðugt í nútíðar samfelagi. Tað er í roynd og veru ikki rætt, tí tað, ið er stóra problemið føroyskum viðvíkjandi, er, at vit snøgt sagt ikki duga føroyskt nóg væl. Frálæran í føroyskum er við øðrum orðum ikki nóg holl, og vit verða so sanniliga heldur ikki stuðlað til at duga føroyskt, tá ið vit lesa tað, ið skrivað verður á føroyskum, tí skrivandi fólk gera sær ongan ómak. Her hugsi eg serstakliga um fjølmiðlafólk okkara. Hvar eru Ívar, Niels Juel, Oskar, Axel og Jóhann Hendrik nú? Stórar saknur er í teimum.«

MÁLIÐ

– Eg skal ikki siga, at orsøkin er beinleiðis likasæla. Men fjølmiðlafólkini duga serliga illa at benda, og tey brúka stundum skeivar fyrisetingar, sigur Ívar Iversen

næmingur í føroyskum. Men tað er lætt at finna út av. Tað er bara at seta allar lærarar til eina Pisa-kanning í føroyskari fyrisøgn stíli, og so at fyrileggja úrslitið Føroya Læraraskúla. Er úrslitið ikki nóg gott, so er uppgávan hjá Føroya Læraraskúla at loysa trupulleikan. Tá tað er gjørt, so hava vit góðar fólkaskúlalærarar í føroyskum, sum kunnu geva skúlabørnunum gott í beini - og minst líka gott sum telegrafisturin, bankamaðurin, presturin, sjónleikararin og málfrøðingurin, sum Annfinnur í Skála saknar, hava givið okkum.

Tá kunnu vit so taka kjakið upp um, hvørt føroysk miðlafólk duga nóg væl at stava føroyskt!

## Onkur má hava ábyrgdina av at læra okkum føroyskt

# Ofta etur hundur tað hann havnar



www.fivestar.fo
ELTON JOHN
TÓRSHAVN 29. JUNI 2010
Atgongumerki fáast á www.fivestar.fo og á Fast støðunum kring landið
eltonjohn.com
FIVE STAR
Undirhald til Føroya fólk
Sosialurin
Fríggjadagur 25. juni 2010 Nr. 99 84. árg. kr. 25,00
BYGMA BALSLEV
sí okkara góðu tilboð á síðu 3
HJARTALEYSAR SPARINGAR
Hans Pauli Strøm: »Hetta er at lumpa pensjónistar«
Javnaðarflokkurin torpederar nú uppskotið hjá Rósu Samuelsen um at niðurleggja 33 pláss á sambýlum. Landsstýriskvinnan sigur, at Hans Pauli Strøm upphevjar seg sjálvan s10-11
VIKUSKIFTI
24 síður
ELTON JOHN
Arousiak bleiv sjómaður í Føroyum VS s16-18
NÚTÍMANS VERKSTAÐUR
BBR
INNI
Reyni Dekkhotel
REYNI SERVICE
Orkusparandi KETIL Arimax 17
SVENDKROSSTEIN

*»Í hesum sambandi skal nevnast tann positiva støðan, at landsstýriskvinnan eftir krøvum frá samgongufeløgum hevur broytt sínar ætlanir um sparingar á Ellis- og røktarheiminum á Tvøroyri, so tillagingin frá nøkrum dupultstovum til einkultstovur verður gjørd líðandi gjøgnum árið, uttan hópuppsagnir av starvsfólki«.*

Soleiðis skrivar Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður í Sosialinum um vikuskkftið. Hjá onkrum skurrar hetta í oyrunum, tí tann 25. juni var hann púra avgjørdur í Sosialinum:

Hann (Hans Pauli Strøm) skilir væl sjónarmiðið um, at tað er ikki nútíðarhóskandi, at eldri fólk búgva í tveymanskømrum.

*»Men so skal Rósa Samuelsen ikki loysa trupulleikan við at niðurleggja pláss. So skal hon loysa trupulleikan við at útvega fleiri pláss í teimum økjum, har umstøðurnar hjá teimum eldru ikki eru nøktandi.*

*- Ein politisk raðfesting hjá samgonguni skal ikki skúgvast til viks av tí at Rósa Samuelsen nú brádliga skal seta nakrar sparingar í verk«, segði Hans Pauli Strøm.*

Men niðurstøðan er enn sum áður, at tá árið er farið, eru átta færri eldrapláss í Suðuroy, ella hvussu skal hetta skiljast?

Og tað var júst tað, sum Hans Pauli ikki góðtók í summar - og heldur ikki Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági...

# Løgreglan bríkslaði dyst av

Tað var ikki dómarin – men løgreglan – sum bríkslaði ein dyst millum Youth Greve og Farum BK av leygardagin. Dysturin var í seriu 5, sum er ein tann lægsta fótbóltsdeildin í Danmark. Dómarin hevði bríkslað dystin av, men spælararnir høvdu ikki hug at fara av vøllinum. Teir kegladust, og løgreglufólk, sum av tilvild vóru til staðar, kendu seg noydd at leggja uppí, áðrenn spælararnir brustu saman at berjast. Tað eydnaðist løgregluni at sissa spælararnar og fáa teir í skiftingarrúmini – og so var dysturin veruliga bríkslaður av.



## Tóm tøl um SEV

HANS DÁVID DAM
KJAK Á SÍÐU 32



## Public Service sáttmálin ein ólukka

EIRIKUR LINDENSKOV
KJAK Á SÍÐU 29

# Snarskiva í 10 ár





Borgaramiðstøðin í Tórshavn hevur nú verið virkin í 10 ár, og kommunan metir, at borgarar hava tikið væl ímóti og brúkt Snarskivuna, ið veitir borgarum í kommununi flestu borgaratænasturnar, kunning og vegleiðing á einum og sama stað.

Tann 1. oktober 2010 fylti Snarskivan hjá Tórshavnar kommunu 10 ár, og dagurin verður hátíðarhildin seinnapartin í dag.

Snarskivan var sett á stovn fyri at geva borgarunum í Tórshavnar kommunu eitt og sama stað at venda sær til í sambandi við kommunalar tænastur, kunning og vegleiðing.

Høvuðsuppgávurnar hjá Snarskivuni eru innan barnaansing, grundstykki, fólkayvirlit, journalrøkt, post-, kunda- og telefonavgreiðslu.

- Okkara fatan er, og tað er dokumenterað í einari brúkarakanning, at borgarar í Tórshavn hava tikið væl ímóti Snarskivuni. Hon tænir endamálinum væl, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Hann leggur dent á, at borgaravenda tænastan skal gerast upp aftur betri við einum munadyggum tænastutilboði á internetinum.

- Vit arbeiða miðvíst við at menna ein borgaraportal á alnetinum, har brúkarin kann samskifta talgilt við Tórshavnar kommunu og trygt avgreiða síni viðurskifti alt samdøgrið, har hann ella hon er stadd, upplýsir Rókur Tummasarson, deildarleiðari á Snarskivuni.

Í sambandi við hátíðarhaldið var samkoma seinnapartin í dag, har Heðin Mortensen segði nøkur orð. Ungi listamaðurin, Ludvík Breckmann læt samstundis um listaframsýning í Snarskivuni.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar**, sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*